LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 10. september 2013
J.Nr.:11/ 201300043 / 25

# Álit

viðvíkjandi klagu um manglandi svar upp á innlitsumbøn

Við teldubrævi, dagfest 29. mai 2013, hevur A, Oyggjatíðindi sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> ”Løgtingsins Umboðsmaður
>
> Skal hervið klaga Vinnumálaráðið fyri manglandi svar í innlitsbønini niðanfyri.
>
> Havi skilt, at Vinnumálaráðið ikki kann ella vil skjalprógva, hvørt Ráðið metir, at B sigur sannleikan ella ikki, tá hann hevði samrøðu við C (landsstýrismannin i Vinnumálum) í 2009 og gjørdi vart við almenna korruptión í Vinnuframagrunninum.
>
> Tá Vinnumálaráðið velur at svara soleiðis, liggur í luftini, at B, ikki sigur sannleikan. Tað er ikki bara óheppið, tað er eisini órímiligt, ósakligt og beinleiðis brot á fyrisitingarlógina.
>
> Nú er tað bara soleiðis, at onnur eisini kunnu hava eina vitan um hesi viðurskiftir, og at tað tí er neyðugt at vita støðuna hjá Vinnumálaráðnum fyri at tryggja, um Ráðið krógvar nakað, ella av misgáum tigur um upplýsingar, sum annars áttu at umfata innlitsbønina.
>
> Av tí, at útlit ikki eru fyri, at Vinnumálaráðið, ella leiðandi løgfrøðingurin, hevur ætlanir um at lýsa málið nærri, verður biðið um, at umboðsmaðurin tryggjar tær neyðugu upplýsingarnar?”

**Málsgongd**
Við teldubrævi, dagfest 8. mai 2013 og 14. mai 2013, sendi Oyggjatíðindi umbøn til Vinnumálaráðið um at fáa innlit í fundarfrágreiðing frá fundi millum landsstýrismannin í Vinnumálum og B, fyrrverandi nevndarlimur í Vinnuframagrunninum.

Klagarin vísir í teldubrævasamskiftinum við Vinnumálaráðið á, at B í teldubrævi til Oyggjatíðindi tann 2. mai 2013 hevur upplýst, at hann var á fundi í 2009 við landsstýrismannin um korruptión í Vinnuframagrunninum.

Vinnumálaráðið hevur í teldubrævi frá 14. mai 2013 boðað klagaranum frá, at aðalráðið kannar, um tað í skjølum Vinnumálaráðsins finst ein fundarfrágreiðing frá einum tílíkum fundi, sum Oyggjatíðindi vil hava innlit í. Kunnað verður samstundis um, at klagarin fær svar í komandi viku.

Við teldubrævi, dagfest 23. mai 2013 og 27. mai 2013, minti Oyggjatíðindi Vinnumálaráðið á innlitsmálið.

Tann 28. mai 2013 fekk klagarin soljóðandi svar upp á innlitsumbøn sína:

> ”A
>
> Vísandi til umsókn tína um innlit í fundarfrásøgn frá fundi millum C (landsstýrismannin í vinnumálum) og B, verður sagt frá, at í skjølum Vinnumálaráðsins finst eingin tílík fundarfrásøgn.”

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 29. mai 2013, boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at klaga hansara fór at verða kannað nærri. Samstundis sendi umboðsmaðurin soljóðandi skriv til Vinnumálaráðið:

> ”Umboðsmaðurin hevur fingið eina klagu frá Oyggjatíðindi, A um manglandi svar frá Vinnumálaráðnum í sambandi við eina innlitsáheitan. Avrit av klaguni er hjálagt.
>
> Umboðsmaðurin hevur gjørt av at kanna hetta málið nærri. Vinnumálaráðið verður í hesum sambandi biðið um at greiða umboðsmanninum nærri frá hesum máli, herundir eisini um nakar fundur ella samrøða, sms’ar ella teldupostar hava verið ímillum C (landsstýrismannin í vinnumálum) og B um støðuna í Vinnuframagrunninum viðvíkjandi korruptión ella líknandi.
>
> Vinnumálaráðið verður eisini biðið um at lata umboðsmanninum til láns øll skjøl (original ella avrit) viðvíkjandi málinum/málum um omanfyri nevndu støðu í Vinnuframagrunninum í 2009 umframt skjalayvirlit.
>
> Biðið verður um, at frágreiðingin og skjølini verða umboðsmanninum í hendi innan 3 vikur.”

Við skrivi, dagfest 11. juni 2013, hevur Vinnumálaráðið latið umboðsmanninum skjølini og soljóðandi frágreiðing:

> ”**Viðvíkjandi klagu frá Oyggjatíðindum, A, dagfest 29. mai 2013**
>
> Víst verður til skriv, dagfest 29. mai 2013, frá Løgtingsins Umboðsmanni viðvíkjandi klagu frá Oyggjatíðindum v. A, dagfest 29. mai 2013, um innlitsumbøn.
>
> Umbidnu skjølini verða borin tykkum, og verður, sum umbiðið, latin hendan frágreiðing í málinum:
>
> Í skrivi, dagfest 11. juni 2009, varð boðað frá, at landsstýrismaðurin hevði valt nýtt stýri fyri Vinnuframagrunnin, sí, j. nr. D, skjal 2 (hetta og onnur skjøl í hesum málinum eru umskrásett frá j. nr. E).
>
> Stutt eftir kom upp, at tað vóru trupulleikar millum táverandi stjóra fyri Vinnuframagrunnin og stýrið fyri grunnin.

18. september 2009 var fundur í Vinnumálaráðnum millum ráðið og nýggja stýrisformannin um málið, og varð avtalað, at stýrið skuldi lata ráðnum frágreiðing um málið, og lat stýrið í skrivi, dagfest 22. september 2009, Vinnumálaráðnum frágreiðing, sí j. nr. F, skjal 1 og 3.

Frágreiðingin frá stýrinum varð við skrivi, dagfest 25. september 2009, send táverandi stjóranum til hoyringar, og við skrivi, dagfest 12. oktober 2009, lat táverandi stjóri við advokati hoyringsskriv í málinum. Hetta varð sent stýrinum til hoyringar, og lat stýrið hoyringssvar í skrivi, dagfest 16. oktober 2009, sí j. nr. F, skjal 6, 7, 8 og 10.

Eftir framhaldandi samskifti millum Vinnumálaráðið og partarnar (stýrið og táverandi stjóran), varð fráfaringaravtala, dagfest 30. oktober 2009, gjørd millum Vinnumálaráðið og táverandi stjóran, j. nr. F, skjal 27 og 28.

Samstundis sum omanfyri nevnda mál var til viðgerðar í Vinnumálaráðnum samskifti B, táverandi stýrislimum um m.a. sms við landsstýrismannin um málið, og eisini eftir at landsstýrismaðurin umvegis G, táverandi deildarstjóra í Vinnumálaráðnum, og stýrisformann hevði gjørt vart við, at hann ynskti, at samskiftið við Vinnuframagrunnin um málið fór fram gjøgnum stýrið og stýrisformannin. Framferðin hjá B, táverandi stýrislimi, hevði við sær, at landsstýrismaðurin valdi at velja ein annan stýrislim í staðin fyri B.

Oyggjatíðindi við A hevur biðið um innlit í fundarfrásøgn frá fundi millum C (landsstýrismannin í vinnumálum), og B um viðurskiftini í Vinnuframagrunninum. Ein tílík fundarfrásøgn er ikki í skjølum Vinnumálaráðsins, og tað hevur A fingið boð um."

Við skrivi, dagfest 13. juni 2013, varð frágreiðingin frá Vinnumálaráðnum send klagaranum til ummælis.

Klagarin boðaði í teldubrævi 24. juni 2013, frá, at hann hevði soljóðandi viðmerkingar:

"**Løgtingsins Umboðsmaður**

Havi hesar viðmerkingar til svarið frá Vinnumálaráðnum:

Leiðandi løgfrøðingurin skrivar í brævi, dagfest 11. juni 2013, at: "Samstundis sum nevnda mál var til viðgerðar í Vinnumálaráðnum samskifti B, táverandi stýrislimum um m.a. sms við landsstýrismannin um málið, …"

Vit mugu ganga út frá, at B, bæði hevur samskift umvegis sms, og umvegis teldu, og tað er hetta samskifti, sum fyrisitingarlógin heimilar innlit í.

Harafturat eru tað ymiskar frágreiðingar um, hví B, í móti sínum vilja, verður koyrdur úr nevndini.

Tað er hinvegin trúligt, at svarið finst í samskiftinum millum táverandi nevndarlimin í Vinnuframagrunninum og landsstýrismannin."

Við skrivi, dagfest 26. juni 2013, og við áminningarskrivi, dagfest 12. august 2013, vóru viðmerkingarnar frá klagaranum sendar Vinnumálaráðnum til ummælis, eins og biðið var um at lata umboðsmanninum til láns skjølini í innlitsmálinum hjá klagaranum saman við skjalayvirlit, tí hesi ikki vóru millum tey skjøl, sum umboðsmaðurin hevði móttikið frá Vinnumálaráðnum tann 11. juni 2013.

Við teldubrævi tann 19. august 2013 móttók umboðsmaðurin umbidnu skjølini.

Tann 20. august 2013 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

**Niðurstøða**
Í málinum, ið umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá Vinnumálaráðnum, finst eingin fundarfrásøgn um fund millum B og landsstýrismannin í vinnumálum um korruptión í Vinnuframagrunninum. Hetta hevur klagarin eisini fingið at vita frá Vinnumálaráðnum í sambandi við innlitsáheitan sína.

Sambært § 4, stk. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) fevnir rætturin til innlit um tey skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans. Ein myndugleiki hevur sostatt ikki skyldu til at framleiða nýggj skjøl í sambandi við eina innlitsáheitan.

Viðgerð mín av hesi klagu snýr seg um, um Vinnumálaráðið við ikki at hava skrivað ein fundarfrágreiðing ella hava skrivað niður samskiftið við B, hevur hildið notatskyldu sína sambært innlitslógini.

*Notatskylda*
Notatskyldan hjá einum almennum myndugleika er ásett í § 6, stk. 1 í innlitslógini.

§ 6, stk. 1 er soljóðandi:

> **§ 6.** Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnugur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum. Hetta er tó ikki galdandi, um upplýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum.

Í viðmerkingunum til danska lógaruppskotið, sum er fyrimyndin fyri okkara innlitslóg, stendur soleiðis í Folketingstidende 1985/86, tillæg A, spalte 217:

> “...
> Afgørende for, om en oplysning skal noteres ned, er, om oplysningen er af en sådan karakter, at den bidrager til at supplere sagens bevismæssige grundlag eller i øvrigt tilvejebringes for at skabe klarhed med hensyn til sagens faktiske omstændigheder. Notatpligten vil således også kunne omfatte oplysninger, der indeholder en subjektivt præget stillingtagen til et forhold, for så vidt vurderingen er af betydning for den administrative bevisoptagelse. ...
>
> Efter formuleringen af den gældende lovs § 4 omfatter notatpligten kun oplysninger, "der mundtligt meddeles en myndighed". Bestemmelsen er imidlertid blevet fortolket udvidende i praksis, bl.a. fordi partens interesse i at blive gjort bekendt med en oplysning er den samme, uanset hvordan myndigheden er kommet i besiddelse af den. Også af hensyn til myndighedernes egen interne sagsbehandling og til en eventuel senere klagebehandling er det af betydning at have et sikkert kendskab til, hvilke oplysninger myndigheden er eller har været i besiddelse af.
> ..."

Folketingets Ombudsmand hevur í FOB nr. 1989.138 soljóðandi fatan av § 6, stk. 1:

> “Bestemmelsen i offentlighedslovens § 6, stk. 1, må efter min opfattelse ses som udslag af en almindelig retsgrundsætning om, at offentlige myndigheder har pligt til at gøre notat om alle

> væsentlige ekspeditioner i en sag, herunder telefonsamtaler, som ikke fremgår af brevvekslingen i sagen eller af sagens dokumenter i øvrigt.
>
> En sådan notatpligt vil ikke blot være en forudsætning for gennemførelse af retten til aktindsigt, men vil normalt også være en forudsætning for, at det efterfølgende kan klarlægges, hvad der er sket i en sag og herved også give mulighed for en effektiv kontrol med, om myndigheden har handlet korrekt.”

Av ummælisskrivinum frá Vinnumálaráðnum sæst, at eitt ávíst samskifti hevur verið millum B og landsstýrismannin, millum annað umvegis sms. Klagarin hevur eisini víst á, at samskiftið millum B og landsstýrismannin eisini hevur verið umvegis teldupost. Hóast samskifti millum omanfyri nevndu persónar sambært upplýsingunum hevur verið, er einki skrivað niður um samskifti teirra millum um korruptión.

Av tí at umboðsmansviðgerðin av málinum fer fram á einum skrivligum grundarlagi, og eg út frá skjølunum í málinum ikki veit at siga, hvat innihaldið í samskiftinum millum B og landsstýrismannin snúði seg um. Eg havi onki grundarlag fyri at meta um, um talan var um upplýsingar, sum vóru av einum slíkum slag, at Vinnumálaráðið átti at skrivað niður innihaldið í samskiftinum, sum B hevði við landsstýrismannin.

Eg fari at nýta høvi at gera vart við týdningin av, at aðalráðið heldur ásetingarnar í innlitslógini um notatskyldu. Havandi í huga, at endamálið við innlitslógin er at styrkja um gjøgnumskygni og opinleika hjá myndugleikum, sum viðgera og taka avgerðir, hevur tað stóran týdning, at myndugleikar duga at handfara og viðgera upplýsingar, sum hann fær, bæði skrivliga og munnliga, við atliti at notatskylduni.

Harumframt skal innlitslógin tryggja borgarum og fjølmiðlum møguleika at fylgja við í, hvat hendir í almennu umsitingini, viðvirka til at skapa áhuga fyri almennum viðurskiftum, og opinleikin skal vera við til at økja álitið á almennu umsitingina.

Innlitslógin hevur serligan týdning fyri fjølmiðlarnar, tí hon gevur teimum møguleika at fylgja við í og halda eyga við, at alt fer rætt fram. Harumframt gevur hon fjølmiðlunum møguleika at viðgera og kunna fólk á røttum faktiskum grundarlagi og kann sostatt fáa beint burtur íkomnar misskiljingar.

Eg fari tí at heita á Vinnumálaráðið um at hava notatskylduna í huga, tá ið upplýsingar ella fráboðanir koma til aðalráðið, herundir eisini hvat slag av upplýsingum talan er um, og um hesar eiga at verða skrivaðar niður í eitt mál.

Burtursæð frá omanfyri standandi viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður